## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Johan Samuelsen farin frá sum lærari

**Fríggjadagin 16. september 2005 var ein innanhýsis móttøka á lærarstovuni í Tórshavnar Kommunuskúla í sambandi við at Johan Samuelsen, lærari, hevur lagt frá eftir sær, eftir at hava verið lærari á skúlanum í 36 ár**



Johan Samuelsen er 59 ára gamal og havnarmaður. Hann tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1969, og hevur verið lærari í Kommunuskúlanum síðan tá.

Hann hevur undirvíst í søgu og fleiri mállærugreinum, serliga føroyskum, enskum og týskum, sum er hansara favoritmál. Í sínum arbeiði hevur hann lagt stóran dent á, at næmingarnir skulu vera fakliga væl fyri. Johan undirvísti eisini á Føroya Handilsskúla frá 1970-80.

Í 1979 bleiv Johan sjúkur og misti likamliga førleikan, soleiðis at hann kom at sita í koyristóli, men hetta hevur avgjørt ikki skert hansara lívsvilja, og hann hevur víst at tað ber væl til at liva og arbeiða á líka fót við øll onnur.

Hann var limur í skúlaráðnum í Havn frá 1989, til skúlaráðini vórðu niðurløgd fyri nøkrum árum síðan.

Johan hevur altíð verið ítróttarmaður, og var hann ein framúr góður flogbóltsspælari. Síðan hann hann misti likamliga førleikan, hevur hann svomið nógv og verið virkin innan Ítróttarsambandið fyri Brekað (ÍSB) og Meginfelag teirra Brekaðu (MBF). Hann hevur eisini luttikið í altjóða svimjikappingum uttanlands.

Johan er ein áhugaverdur persónur. Hann hevur stóran áhuga í samfelagsviðurskiftum og er tí søguliga. Hann hevur eitt gott minni og kann siga frá nógvum áhugaverdum og stuttligum hendingum, serliga um Havnini og Hornabø, har hann vaks upp.

Johan er giftur Johonnu, f. Clementsen, úr Elduvík. Tey eiga trý børn: Bergur og Birita, sum búgva í Havn, og Magnus sum býr í Funningi. Barnabørnini eru 6 í tali.

---

Fyri 25 árum síðan:

## Loppumarknaður í gongugøtuni

13. september 1980 skipaðu starvsfólk á Landssjúkrahúsinum fyri loppumarknaði í gongugøtuni í Havn til frama fyri nýtt røktarheim. Nógv fólk var og vitjaði marknaðin, sum gav 53.000 krónur. Nakað framman undan var skipað fyri einum fótbóltsdysti millum starvsfólk á Landssjúkrahúsinum. Tað tiltakið gav 12.000 krónur, sum fór óskert til sama endamál.

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1980*



---

## Fólkaheilsurenning í Suðuroy

**Leygardagin 24. september verður skipað fyri Fólkaheilsurenning í Suðuroy**

HEILSURENNING
*tíðindaskriv*

Tiltakið er fyri øll, bæði børn, ung og gomul. Endamálið við fólkaheilsurenningini er ikki at kappast, men at geva øllum, bæði yngri og eldri, eitt gott og hugnaligt høvi at røra seg. Tey luttakandi kunnu antin ganga ella renna teinin. Mest umráðandi er at vera við. Av tí sama verður tiltakið ikki skipað sum ein vanlig kapping, har vinnararnir fáa heiðursmerki. Í staðin verður lutakast um ymsar vinningar millum øll tey luttakandi. Øll tey, sum luttaka, fáa eina t-shirt við prenti á til minnis um dagin.

Renningin byrjar við skúlan í Trongisvági. Túrurin, sum gongur eftir ovara vegi, er væl merktur allan vegin og ongin ferðsla er á vegnum hesa løtuna.

Børnini renna ella ganga 2 kilometrar og vaksin kunnu velja 2 ella 5 kilometrar. Á styttra teininum verður vent við húsini hjá Jan Rasmussen, meðan vent verður við Sjúkrahúsið á longra teininum. Teinarnir enda báðir í skúlagarðinum.

Luttakararnir verða býttir í tveir bólkar: børn (fødd 1992 og yngri), vaksin (fødd 1991 og eldri).

Fólkaheilsurenningin byrjar klokkan 15, og byrjanarnummar fæst í skúlagarðinum í Trongisvági 2 tímar undan renningini. Børn og vaksin gjalda 20 kr. fyri at vera við og peningurin verður goldin, tá byrjanarnummarið verður avheintað.

Undir renningini skipa Hjartafelagið, Fyribyrgingarráðið og onnur áhugafeløg fyri tiltøkum, har tað ber til at fáa upplýsing og ráðgeving um heilsuna.